# Dátuverndakunning/Privatlívspolitikkur

DUGNI hevur dátaábyrgd av upplýsingunum, sum vit savna um teg, og vit tryggja, at tínar persónupplýsingar verða viðgjørdar sambært ásetingarnar í dátuverndarlógini.

Vit taka tína dátuvernd í álvara, og hava tí viðtikið hendan privatlívspolitikk, sum sigur tær, hvussu vit handfara tínar persónupplýsingar

## Kontaktupplýsingar

Um tú ynskir at venda tær til okkum viðvíkjandi okkara viðgerð av tínum persónupplýsingum, kanst tú gera tað fylgjandi:

DUGNI
Á Hjalla 7a
Postsmoga 301,
110 Tórshavn.

Tpost: dugni@dugni.fo ella telefon 350070

Um tú hevur spurningar til okkara viðgerð av tínum upplýsingum, ert tú eisini altíð vælkomin at seta teg í samband við okkara dátuverndarfólk sum er Jens Chr. Olsen:

- Umvegis teldupost: Send teldupost til jco@eirin.fo
- Umvegis telefon: Tú kanst ringja til dátuverndarfólkið á telefon +298 794070
- Umvegis bræv: Jens Chr. Olsen, Undir Nesinum 14, FO-650 Toftir.

# Viðgerð av persónupplýsingum

Persónupplýsingar eru allar upplýsingar, sum á ein ella annan hátt kunnu vísa til tín. Um so er, at tú ikki ynskir, at vit viðgera hesar upplýsingar, kann tað gerast trupult at varðveita og halda møguligar avtalur.

## Næmingar og arbeiðsfólk

Um tú kannar møguleikan at koma í arbeiðsbúgving ella í tillaga arbeiði hjá okkum, er neyðugt, at vit fáa fylgjandi persónupplýsingar um teg:

- Navn, bústaður, telefonnummar og teldupostur.

Persónupplýsingar um næmingar verða savnaðar til fylgjandi endamál:

- Møguligt framtíðar samstarv ella skúlagongd.
- Fyrisiting av tínum sambandi við okkum.
- Møgulig onnur endamál.

Hesar upplýsingar samlast grundað á eitt av fylgjandi lógarheimildum:

- Eitt nágreiniligt samtykki er givið við samtykki í talgildu umsóknini á heimasíðuni  sbrt. §12, stk. 1, nr. 1 í dátuverndarlógini.
- Viðgerðin verður gjørd grundað á, at ”hald eina avtalu” sbrt. §8, stk. 1, nr. 2 í dátuverndarlógini, í sambandi við viðger av tíni umsókn/fyrispurningi.

- Viðgerðin verður gjørd grundað á, at "halda rættarliga skyldu", sbrt. §8, stk. 1, nr. 3 í dátuverndarlógini, og viðgerðin hjá okkum er sambært galdandi lóg.
- Samfelagsáhugamál og mynduleikaútinnan sbrt. §8, stk. 1, nr. 5 í dátuverndarlógini, sum er at veita ásettu viðgerð sum er kravd av okkum, ger tað neyðugt, at viðgera hesar persónupplýsingar.

Tíðarskeiðið, sum persónupplýsingarnar verða goymdar

- Dugni hevur skyldu at ansa eftir, at persónupplýsingar verða goymdar soleiðis, at tað ikki er gjørligt at eyðmerkja skrásetta longur enn neyðugt við atliti at endamálinum við viðgerðini.
- Sum almennur myndugleiki skjalførir Dugni post, sum kemur inn og fer út. Í hesum sambandi fylgir Dugni galdandi leiðreglum fyri, hvussu leingi upplýsingarnar skulu goymast. Dugni hevur sambært fyrisitingarlógini og skjalasavnslógi o.ø. skyldu at varðveita upplýsingar í málum. Mál hjá Dugna verða flutt á goymslu hjá Tjóðskjalasavninum sambært løgtingslóg um skjalasøvn. Tá ið upplýsingarnar eru goymdar á Tjóðskjalasavninum ella vrakaðar, hevur Dugni ikki longur atgongd til upplýsingarnar.

## Næmingar

Um tú ynskir at gerast næmingur hjá okkum, er neyðugt, at tú sendir eitt umsóknarblað til okkum har vit biðja um at fáa fylgjandi persónupplýsingar frá tær:

- Kontaktupplýsingar: Navn, Bústaður, Postnummar, Býur, Føðingardagur, Telefonnummar, Fartelefon og Teldupost.
- Avvarandi: Navn, Bústaður, Postnummar, Býur, Starv og Telefonnummar. .
- Socialráðgevi: Navn, Teldupostur og Telefonnumar.
- Lækni og aðrir samstarvspartar:
    - Lækni: Navn og Telefonnummar.
    - Aðrir samstarvspartar (t.d. stuðul, fyrsioterapeutur, sálarfrøðingur e.l.)
- Hevur tú stuðul: Navn, Telefonnummar, Tímar (og til hvat)
- Inntøkugrundarlag: Upplýsingar um forsorg, pensjón, avslag til pensjónsumsókn og um ALS.
- Upplýsingar um: Borgarastøðu, Skúlagond og útbúgving, Arbeiðsroyndir, Arbeiðsfremjandi tiltøk og Serlig fyrilit (so sum upplýsingar um sálarligar, fysiskar ella sosialar trupulleikar, sum tunglyndi, rørslutrupulleikar ella rúsevnismisnýtslu v.m. Upplýsingar um heilivág, um trupulleikar í skúlanum, um uppvenjing og um nýtslu av hjálpartólum og til endan um núverandi støðu og annað)
- Upplýsingar um tú ert fyritíðarpensjonistur ella undir forsogn:
    - Stað
    - Hvat er títt ynski
    - Viðmerkingar
- Upplýsingar um tú søkir inn á skúlan við Áir: Flokk og um kostdeild og grundgeving um hví tú søkir inn á skúlan við Áir
- Heimildarváttan.

Persónupplýsingar um næmingar verða samlaðar til fylgjandi endamál:

- Viðgerð av tínum skúlagongd ella samstarv við okkum
- Fyrisiting av tínum sambandi til okkum
- Møgulig onnur endamál.

Hesar upplýsingar samlast grundað á fylgjandi lógarheimild:

- Eitt nágreiniligt samtykki er givið í talgildu umsóknini á heimasíðuni, sbrt. §12, stk. 1, nr. 1 í dátuverndarlógini.
- Viðgerðin verður gjørd grundað á, at "hald eina avtalu" sbrt. §8, stk. 1, nr. 2 í dátuverndarlógini, í sambandi við viðger av tíni umsókn/fyrispurningi.
- Viðgerðin verður gjørd grundað á, at "halda rættarliga skyldu", sbrt. §8, stk. 1, nr. 3 í dátuverndarlógini, og viðgerðin hjá okkum er sambært galdandi lóg.
- Samfelagsáhugamál og myndulеikaútinnan sbrt. §8, stk. 1, nr. 5 í dátuverndarlógini, sum er at veita ásettu viðgerð sum er kravd av okkum, ger tað neyðugt, at viðgera hesar persónupplýsingar.

Tíðarskeiðið, sum persónupplýsingarnar verða goymdar

- Dugni hevur skyldu at ansa eftir, at persónupplýsingar verða goymdar soleiðis, at tað ikki er gjørligt at eyðmerkja skrásetta longur enn neyðugt við atliti at endamálinum við viðgerðini.
- Sum almennur myndugleiki skjalførir Dugni post, sum kemur inn og fer út. Í hesum sambandi fylgir Dugni galdandi leiðreglum fyri, hvussu leingi upplýsingarnar skulu goymast. Dugni hevur sambært fyrisitingarlógini og skjalasavnslógi o.ø. skyldu at varðveita upplýsingar í málum. Mál hjá Dugna verða flutt á goymslu hjá Tjóðskjalasavninum sambært løgtingslóg um skjalasøvn. Tá ið upplýsingarnar eru goymdar á Tjóðskjalasavninum ella vrakaðar, hevur Dugni ikki longur atgongd til upplýsingarnar.

## Veitarar og samstarvsfelagar

Um tú ynskir at verða veitari ella samstarvsfelagi hjá okkum, er neyðugt, at vit fáa fylgjandi persónupplýsingar um teg:

- Kontaktupplýsingar: Navn, bústaður, telefonnummar og teldupostur.

Persónupplýsingar, um veitarar og samstarvsfelagar, verða samlaðar grundað á fylgjandi endamál:

- Til viðgerð av okkara keypi/veitan
- Fyrisiting av tínum sambandi við okkum

Hesar upplýsingar samlast grundað á fylgjandi lógarheimild:

- Viðgerðin verður gjørd grundað á, at "hald eina avtalu" sbrt. §8, stk. 1, nr. 2 í dátuverndarlógini, í sambandi við viðger av tíni umsókn/fyrispurningi.

Tíðarskeiðið, sum persónupplýsingarnar verða goymdar

- Dugni hevur skyldu at ansa eftir, at persónupplýsingar verða goymdar soleiðis, at tað ikki er gjørligt at eyðmerkja skrásetta longur enn neyðugt við atliti at endamálinum við viðgerðini.
- Sum almennur myndugleiki skjalførir Dugni post, sum kemur inn og fer út. Í hesum sambandi fylgir Dugni galdandi leiðreglum fyri, hvussu leingi upplýsingarnar skulu goymast. Dugni hevur sambært fyrisitingarlógini og skjalasavnslógi o.ø. skyldu at varðveita upplýsingar í málum. Mál hjá Dugna verða flutt á goymslu hjá Tjóðskjalasavninum sambært løgtingslóg um skjalasøvn. Tá ið upplýsingarnar eru goymdar á Tjóðskjalasavninum ella vrakaðar, hevur Dugni ikki longur atgongd til upplýsingarnar.

## Starvsumsóknir/umsøkjarar

Tá ið vit móttaka eina starvsumsókn og fylgiskjøl, verða øll skjølini lisin, av tí ávísa leiðaranum, við tí endamáli, at svara og meta um innihaldið í sambandi við eitt ávíst arbeiði. Okkara lógarheimild til

viðgerðina av umsóknini er "Samfelagsáhugamál og mynduleikaútinnan" sbrt. §8, stk. 1, nr. 5 í dátuverndarlógini, sum ger tað neyðugt, at viðgera hesar persónupplýsingar.

Umsókn og fylgiskjøl verða deild víðari innanhýsis til persónar, sum eru í setannarbólkinum, og verða ikki víðarigivin til onnur uttanfyri stovnin.

Harumframt brúka vit til tíðir uttanhýsis felag at seta fólk, og tey fáa eisini innlit í umsóknina og fylgiskjølini hjá tær.

Persónupplýsingarnar, sum koma fram í setanartilgongdini, verða viðgjørdar við fylgjandi grundarlagi:

- Samtykki, sbrt. §8, stk. 1, nr. 1 í dátuverndarlógini; er givið av umsøkjaranum í sambandi við innsendanini av CV og umsóknini.

Umsóknir og fylgiskjøl verða goymd, til rætti umsøkjari er funnin, og setannartilgondin er endað. Eftir hetta verða umsókn og fylgiskjøl, hjá teimum sum ikki fingu starvið, strikað. Um ynski er at goyma umsóknina og fylgiskjøl, skal stovnuring hava samtykki til hetta.

Tá ið talan er um óbidnar umsóknir, verða umsókn og fylgiskjøl goymd í mestalagi 12 mánaðir, fyri síðani at verða strikað.

Um umsókn og fylgiskjøl verða goymd í meiri enn 12 mánaðir, skal biðjast um eitt nýtt samtykki frá umsøkjaranum.
Títt samtykki er sjálvboðið, og tú kanst til einahvørja tíð taka tað aftur við at venda tær til okkum. Nýt kontaktupplýsingarnar omanfyri, um tú ynskir fleiri upplýsingar.

# Aðrir upplýsingar um viðgerð

## Trygd

Vit hava sett hóskandi tøknilig og bygnaðarlig tiltøk í verk fyri at tryggja, at tínar upplýsingar av tilvild ella ólógliga ikki verða strikaðar, almmannakunngjørdar, burturblivnar, minka í virði, at nakar óviðkomandi fær hendur á tær, verða misbúktar ella á ein ella annan hátt verða viðgjørdar í stríð við lógina. Dátuábyrgdarin tryggjar, at viðgerðin bert kann fara fram, tá ið allar dátutrygdarreglar verða fylgdar iflg. Dátuverndarlóginia § 7

- backup skal verða tikið, og at
- mannagongdir fyri at endurstovna data er gjørd fyri allar servarar.
- Atgongd til persónupplýsingar er bygt á brúkara-ID og persónligt loyniorð vm.

## Dátaminimering

Vit savna, viðgera og goyma bert persónupplýsingar, sum eru neyðugar í sambandi við at náa okkara ásettu endamál. Harafturat kann tað verða lógargivið, hvat slag av persónupplýsingum, er neyðugar at savna og viðgera í samband við okkara virksemi. Nøgdin og slagið av persónupplýsingum vit viðgera, kann verða ásett av tørvinum at halda eina avtalu ella øðrum lógarásettum skyldum.

## Dagførdar upplýsingar

Okkara tænasta er treytað av, at tykkara upplýsingar eru rættar og dagførdar, og vit biðja tykkum upplýsa okkum um týðandi broytingar í tínum upplýsingum. Tit kunnu nýta kontaktupplýsingarnar omanfyri, at siga okkum frá, um broytingar á hesum øki, so syrgja vit fyri, at dagføra tínar persónupplýsingar. Um vit sjálvi leggja merki til, at upplýsingarnar ikki eru rættar, dagføra vit upplýsingarnar og geva tær boð um hetta.

### Víðarigevan av upplýsingum

Vit brúka fleiri triðjapartar til goymslu og viðgerð av dáta, herímillum veitarar av KT-loysnum.  Hesi viðgera bert upplýsingar okkara vegna, og skulu ikki brúkast til egið endamál. Í onkrum førum verður dáta víðarigivið til aðrar myndugleikar og aðrar dátumóttakarar.

Vit brúka bert dátaviðgerðar úr EU ella tryggum triðjalondum, sum hava neyðugu trygdarviðurskiftini í ordan, umframt feløg í londum, sum kunnu veita nøktandi dátuverndartrygd.

### Dugni brúkar Facebook/Instagram

Dugni hevur eina Facebook/Instagram síðu, sum verður brúkt til kunning og ymsar lýsingar m.a. í sambandi við smásølu av tí, sum er gjørt á Hjalla, á Kambsdali, í Klaksvík og í Suðuroy.  Tú eigur at vera vitandi um, at Facebook savnar inn upplýsingar um teg við at brúka farspor, tá tú brúkar Facebook síðuna hjá Dugna.  Tað hevur við sær, at vit kunnu fáa hagtøl yvir vitjandi á síðuni, og Facebook brúkar hesar upplýsingarnar at tillaga tín vanga og fyri at vita, hvørjar lýsingar tú skal síggja.

Um tú sært facebook er tað helst tí tú hevur skrásett tín vanga á facebook og hevur góðtikið politikkin hjá Facebook.

Her kanst tú lesa meira um privatlívspolitikkin hjá Facebook/Instagram.

## Tíni rættindi

- Tú hevur til eina og hvørja tíð rætt til, at fáa upplýst hvat fyri upplýsingar vit viðgera um teg, hvar tær koma frá, og hvat vit brúka tær til. Tú kanst eisini fáa upplýst, hvussu leingi vit goyma tínar persónupplýsingar, og fáa at vita, hvør fær upplýsingarnar um teg, í tann mun vit víðarigeva upplýsingar í Føroyum og uttanlands.

- Um tú biður um tað, kunnu vit upplýsa/geva tær upplýsingarnar, sum vit viðgera um teg. Heimild kann tó verða avmarkað, um privatlívið hjá øðrum skal verjast, handilsloyndarmál og ólikamlig rættindi.

- Um tú heldur, at persónupplýsingarnar, sum vit viðgera um teg eru skeivar, hevur tú rætt til at fáa tær rættaðar. Tú skalt venda tær til okkum og upplýsa okkum um, hvar feilurin er, og hvussu tað kann rættast.  Vit heita á teg,  at verða neyvur um tínar umbidnu rættingar, ella kann tað gerast trupult hjá okkum, og tað kann í ávísum førum føra til, at vit ikki kunnu eftirlíka tínum rættingum.

- Í summum førum, hava vit skyldu at sletta tínar persónupplýsingar. Tað geldur t.d., um tú tekur eitt eventuelt samtykki aftur. Um tú heldur, at tínar upplýsingar ikki longur eru neyðug í samband við tað endamál, sum vit heintaðu tað til, so kanst tú biðja um at fáa tað slettað. Tú kanst eisini seta teg í samband við okkum, um tú heldur, at tínar persónupplýsingar verða viðgjørd ímóti lógini ella øðrum rætsligum avtalum.

- Tú hevur rætt til at senda eina klagu til dátueftirlitið (www.dat.fo)

  Dátueftirlitið
  Heiðavegur 25
  FO-600  Saltangará
  Tlf.: (+298) 309100
  Teldupostur: dat@dat.fo

- Tú hevur rætt at nokta okkara viðgerð av tínum persónupplýsingum. Tú kanst eisini nokta, at vit víðarigeva tínar upplýsingar til marknaðarføring. Tú kanst brúka okkara upplýsingar her ovast til

at senda tína klagu. Um tín klaga er heimilda, syrgja vit fyri at steðga viðgerðini av tínum persónupplýsingum.

- Tú hevur møguleika at gera brúk av dátaportabilitet, um so er at tú ynskir at tínar upplýsingar verða fluttar til ein annan dátaábyrgda ella dátaviðgera
- Vit strika tínar persónupplýsingar, tá tær ikki longur eru neyðugar fyri tað endamálið, sum tær vóru samlaðar til.

Tá ið tú vendir tær til okkum, við eini áheitan um at rætta ella sletta tínar persónupplýsingar, kanna vit, um tú lýkur treytirnar, og so gera vit broytingarnar ella sletta upplýsingarnar so skjótt sum gjørligt.

Tú kanst brúka tíni rættindi við at venda tær til okkum. Okkara upplýsingar sært tú ovast í skjalinum

Dagført: 15. januar 2024